## Katrin rør í Lüzern

Seinasti world-cup róðurin í ár verður í Lüzern um vikuskiftið. Katrin Olsen er aftur millum luttakararnar á danska landsliðnum, og hesa ferð eru vónirnar um sigur ikki heilt ongar. Kinversku róðrarkvinnurnar taka nevnliga ikki lut í kappingini. Talan verður tó kortini um kapping, tí millum tær 20 manningarnar, sum eru tilmeldaðar, eru bátar úr eitt nú Canada, Australia og USA. Til ber at fylgja róðrunum á HYPERLINK "http://www.worldrowing.com" www.worldrowing.com



## Bianchi til City-álopið

Hóast hann hevur vant undir Svenn Gøran Eriksson seinastu vikuna, so verður tað ikki lætt hjá Christian Restorff Mouritsen at vinna sær pláss í álopinum hjá liðnum. Fyrsta keypið hjá svenska venjaranum verður eftir øllum at døma italski framherjin, Rolando Bianchi. Bianchi var besti málskjúttin í seriu A í fjør, og fleiri av europisku stórfeløgunum hava ligið framvið í royndunum at tryggja sær undirskrift hansara. Manchester City skal rinda á leið 90 milliónir kr. til Reggiana fyri spælaran.

# Marathon verður sunnudagin



*42.194 metrar skulu leggjast aftur um bak, áðrenn greiða fæst á, hvør verður vinnari av Tórshavn Marathon sunnudagin*

**Sunnudagin stendur Tórshavn Marathon aftur á skránni. Higar til hava 24 rennarar boðað frá luttøku**

MARATHON
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Aftur í ar fara føroyskir og útlendskir rennarar at kappast í Tórshavn Marathon. Hetta er fjórða ferðin, at kappingin verður skipað, og undanfarnu árini hevur luttøkan verið heilt góð.

Tað er tó ikki so, at bert rennarar, ið taka allan marathon-teinin, kunnu taka lut. Skipað verður eisini fyri kapping á hálvum teini, eins og stuttleikarenning fyri vaksin og børn verður skipað yvir ávikavist 5,8 og 3 kilometrar.

Higar til hava 73 rennarar teknað seg til renningina, og av hesum hava tey 24 sett sær fyri at renna allan marathon-teinin, har renningin samstundis er FM-kapping.

Renningin byrjar klokkan 13, og er starturin í Miðbýnum. Teinurin, sum skal rennast, eru fyrst 5,8 kilometrar í býnum. Síðani verður móti Kaldbak, aftur til Havnar, fram við Strond og so aftur til Miðbýin, har málið eisini er. Kort yvir teinin, har drykkipostar eisini eru frámerktir, sæst á síðuni, www.torshavnmarathon.com.

Klokkan 17 verða vinningarnir handaðir fremstu rennarunum.

# Startrøðin á vestanstevnu

Fleiri manningar eru, sum kunnu vissa sær FM-heitið, tá róð verður á Sørvági komandi leygardag. Grundað á róðrarnar á Fjarðastevnu verður startrøðin til ymsu róðrarnar hendan

**5-mannafør, dreingir**

| | |
|---|---|
| 5 | Blikur |
| 6 | Junkarin |
| 7 | Tjaldrið |
| 8 | Havfrúgvin |
| 9 | Sílið |
| 10 | Jallurin |
| 11 | Drekin |
| 12 | Teistin |
| 13 | Fípan Fagra |

**6-mannafør, kvinnur**

| | |
|---|---|
| 8 | Lómur |
| 9 | Jarnbardur |
| 10 | Kollfirðingur |

**5-mannafør, gentur**

| | |
|---|---|
| 6 | Teistin |
| 7 | Blikur |
| 8 | Drekin |
| 9 | Hvassi |
| 10 | Tambar |
| 11 | Ørnin |

**5-mannafør, kvinnur**

| | |
|---|---|
| 5 | Jallurin |
| 6 | Teistin |
| 7 | Frúgvin |
| 8 | Fípan Fagra |
| 9 | Sílið |
| 10 | Ørnin |
| 11 | Ritan |
| 12 | Erla Kongsdóttir |
| 13 | Blikur |

**6-mannafør, menn**

| | |
|---|---|
| 5 | Kollfirðingur |
| 6 | Lómur |
| 7 | Jarnbardur |
| 8 | Tvørabáturin |
| 9 | Sundabáturin |
| 10 | Strálan |
| 11 | Rádni |
| 12 | Riddarin |

**8-mannafør**

| | |
|---|---|
| 7 | Ørvur |
| 8 | Árnfirðingur |
| 9 | Heiðabáturin |
| 10 | Argjabáturin |
| 11 | Knørrur |

**10-mannafør**

| | |
|---|---|
| 8 | Vestmenningur |
| 9 | Eysturoyingur |

## Ungverjarnir við á Streymnesi

**Nýggju spælararnir hjá EB/Streymi eru í hópinum, tá teir í kvøld skulu spæla seg í fyrstu løgmansfinaluna hjá felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kárloy Potemkin og Zsolt Szekeres skuldu eftir ætlan vera partur av liðnum, tá EB/Streymur seinasta vikuskifti spældi móti B71. Tað eydnaðist tó ikki at fáa spæliloyvini greidd til tíðina, men nú er hetta tó komið í rættlag, sigst.

Og so er einasti spurningurin, hvørt tað eydnast EB/Streymi at spæla seg í fyrstu steypafinaluna hjá felagnum. Úr fyrru hálvfinaluni hava teir eina 2-0 leiðslu, og tí standa teir avgjørt við betru kortunum á hondini. Og við einum hópi, sum fyri fyrstu ferð í ár er púrasta fullmannaður, fær útgangsstøðið hjá venjarunum ikki verið nógv betri.

Hjá Skála er útgangsstøðið ikki heilt so optimalt. Fyrst og fremst, tí teir eru aftan fyri við tveimum málum undan dystarbyrjan, men eisini tí liðnum vantar tveir av annars føstu brikkunum.

John Petersen, sum nú eisini er spælandi venjari hjá Skála, hevði longu lagt sær eina uttanlandsferð til rættis, áðrenn hann gjørdist venjari. Og tí er hann í hesum døgum á Tenerifa. Hartil er Pauli G. Hansen eisini burturstaddur, so tað verður uttan teir báðar, at Skála skal royna at venda 0-2 til í minsta lagi 2-2.